## Froðba fær vøll

Um stutta tíð sleppa børn og ung í Froðba at stuttleika sær á einum sparkivølli. Tvøroyrar kommuna er farin undir útgrevsturin og at fylla upp til ein sparkivøll í bygdini. Vøllurin og girðingarnar eru bílagdar, og gongst sum ætlað, verður sparkivøllurin hjá froðbingum liðugur eina ferð seinni í heyst. Hetta er annar sparkivøllurin í kommununi. Hin er í Trongisvági, og hann bleiv tikin í nýtslu í vár.

*Kelda: www.sudurras.fo*

## Bispur sigur stopp

Í Noregi er næstan einki mark fyri, hvat fólk kunnu finna uppá, tá tey skulu giftast. Summi vilja sleppa at hanga í fallskíggja, meðan tey verða vígd, og í onkrum føri hevur prestur vígt eitt par inni í einari telefonboks. Men nú hevur biskupurin í Agder, Olav Skjeveland, mist tolið við hugflognum hjá teimum ungu. Hann sigur, at kirkjan er sjálvandi fegin um, at fólk giftast, men at máti skal vera við, hvar tey kunnu giftast.

# Klamydia følnað aftur

**Kynssjúkan klamydia, ið hevur blómað í Føroyum síðani aldarskiftið, tykist vera følnað aftur. Føroyingar ansa betur eftir, heldur landslæknin. Menn, ið lata seg kanna fyri sjúkuna, sleppa nú undan tí ótespiliga stálpinninum**

KYNSSJÚKUR
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*



*Ótespiligi stálpinnurin, sum varð koyrdur nakrar sentimetrar upp í urinrørið hjá monnum, ið lótu seg kanna fyri klamydia, er farin í søguni. Nú kann hetta gerast við eini einfaldari urinroynd. Hjá kvinnum er tó framvegis neyðugt við undirlívskanning hjá kommunulæknanum*

*mynd: Jens Kristian Vang*

Føroyingar hava tikið klamydia í álvara. Kynssjúkan, sum er fleirfaldað seinastu tíggju árini, er nú minkað aftur, vísa tøl frá landslæknanum. Í fjør vórðu 111 tilburðir av sjúkuni staðfestir, og tað er ein minking á næstan einum fjórðingi í mun til 2004, sum var metár við 146 staðfestum tilburðum av klamydia.

– Nú skulu tølini sjálvandi takast við fyrivarni, tí fleiri ganga við sjúkuni uttan at vita av tí – eg vildi mett, at veruliga talið er fimmfaldað - men her sæst ein gongd, ið vísir, at føroyingar ansa betur eftir, heldur Høgni Debes Joensen, landslækni.

### Stálpinnurin horvin

Tølini frá landslæknanum vísa eisini, at føroyingar kanna seg meir fyri sjúkuni enn áður. Í fjør vórðu 1068 fólk kannað. Tað er næstan 100 meir enn árið fyri. Landslæknin metir orsøkina fyrst og fremst vera ta upplýsing, sum hevur verið frammi um sjúkuna í seinastuni.

– Tað gongur rætta vegin. Átøkini hava riggað, staðfestir landslæknin.

Ein onnur orsøk til, at fleiri føroyingar lata seg kanna, kann vera broytta kanningarmannagongdin. Hjá fleiri kommunulæknum stendur monnum nú í boði at pissa í eitt glas, sum verður sent til kanningar. Fyrr var neyðugt at fáa ein stálpinn, ið minti um ein oyrapinn, nakrar sentimetrar upp í urinrørið. Ein ótespilig kanning, mettu fleiri. Sum nevnt er kanningin hjá monnum nú bert ein lítil urinroynd. Hjá kvinnum er tó framvegis neyðugt við eini undirlívskanning hjá kommunulæknanum.

### Kann elva til barnloysi

Klamydia er ein bakteria, sum ger innrás í kyknurnar í urinrørinum og í lívmóðurhálsinum, har bakterian nørist. Størsti vandin við kynssjúkuni er, at hon hjá kvinnum kann verða orsøk til barnloysi. Menn, sum fáa bruna í hjáeistuna, kunnu eisini gerast sterilir.

Klamydia fæst við kynsligum sambandi. Sjúkueyðkennini eru útflot, men í flestu førum kunnu fólk ganga við sjúkuni uttan sjúkueyðkenni. Sjúkan er løtt at viðgerða. Antibiotikatablettir beina vanliga lættliga fyri henni.

Landslæknin:

# Fosturtøkurnar í Danmark eru ein myta

**Talið á framdum fosturtøkum í Føroyum er framvegis sera lágt í mun til hini grannalondini. Sagt verður, at veruliga talið er nógv hægri, tí fleiri hundrað føroyskar kvinnur fáa fosturtøkuna framda í útlandinum, men hesum trýr landslæknin einki uppá**

FOSTURTØKA
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

29 kvinnur fingu fosturtøku í Føroyum í fjør, vísa hagtølini. So lágt hevur talið á framdum fosturtøkum ikki verið seinastu 10 árini, ið annars hevur ligið millum smá 40 og góð 50.

Í mun til grannalondini er talið sera lágt, og fleiri røddir hava verið frammi um, at hagtølini ikki kunnu nýtast til so nógv, tí veruliga talið er nógv hægri.

Av tí at vit ikki hava fría fosturtøka í Føroyum, verður sagt, at fleiri kvinnur fáa fosturtøkuna framda í Danmark. Meir enn 200 kvinnur, vil onkur vera við.

Men hesum trýr landslæknin ikki.

– Eg havi eingi tøl at vísa á, men talið er eftir mínum tykki ikki nær námind teimum 200 framdu fosturtøkunum. Eg hevði ikki verið bilsin, um talið hinvegin lá undir tey tíggju, sigur Høgni Debes Joensen, landslækni.

### Grønland ekstremt

Í Danmark verða umleið 240 fosturtøkur framdar pr. 1000 nýfødda barn. Í Noregi er talið á leið tað sama, meðan tað í Svøríki er nakað hægri, nevniliga upp ímóti 350 framdar fosturtøkur pr. 1000 nýfødda barn.

Í Grønlandi, har frí fosturtøka er, er talið ekstremt. 970 framdar fosturtøkur pr. 1000 nýfødda barn. Við øðrum orðum verða næstan eins nógvar fosturtøkur framdar, sum børn verða fødd.



*– Eg hevði ikki verið bilsin, um talið lá undir tey tíggju, sigur Høgni Debes Joensen, landslækni um talið á føroyskum kvinnum, ið fáa framda fosturtøku í Danmark*